# ítróttur

Nr. 81 • hósdagur • 29. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


**Dystirnir hjá Føroyum**

| | | |
|---|---|---|
| 28.04 | 15.30 | Belgia-Føroyar |
| 29.04 | 13.30 | Føroyar-Ísrael |
| 30.04 | 15.30 | Letland-Føroyar |
| 01.05 | | Fyrri plaseringsdystur |
| 02.05 | | Seinni plaseringsdysturin |

# Hondbóltskvinnurnar sleptar upp á fjall

**Talan var um eina bæði langa og drúgva ferð, áðrenn landsliðshópurin hjá kvinnum av álvara kundi fara at gera seg til uppgávurnar í Challenge-Trophy kappingini**



*Gott er at hava okkurt at tríva í á drúgvu bussferðini. Her er tað Helena Dam Poulsen, sum roynir at stytta sær stundir við lesnaði*



*Tað var ikki sørt, at smílini komu fram, tá landsliðshópurin loksins var komin upp á pláss í Andalo*

HONDBÓLTSFERÐ


*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Andalo, Italia: Yvirskriftin kundi kanska sipað til støðuna fyri góðum trimum árum síðani, tá kvinnulandsliðið í hondbólti júst hevði leikt tveir undankappingardystir móti Svøríki.

Síðani hevur nevnliga onkra staðni millum lítið og einki verið gjørt, til tess at fáa eitt kvinnulandslið í hondbólti, men nú verður tó byrjað aftur.

### Kilometra hædd

Og tað byrjaði so eisini við, at kvinnurnar vórðu sleptar upp á fjall. Andalo, har landsliðshópurin heldur til í Italia liggur nevnliga í 1.050 metra hædd, so hóast veðrið í Norðuritalia hevur verið av tí besta higartil, so er tó avmarkað, hvussu nógv av hitanum megnar at leita sær upp í hæddirnar.

Áðrenn hópurin kom somikið langt, so máttu tær tó ígjøgnum eina hampuliga drúgva ferð. Eftir at tær síðani fríggjadagin í farnu viku hava verið á eini stuttari venjingarlegu í Danmark, stóð útpurringin tíðliga á skránni týsmorgunin.

Longu 8.30 skuldi flogfarið úr Kastrup á flog, og sjálvandi skuldi check-in við meira fáast frá hondini undan hesum, og tí mundi sólin valla hava sent fyrstu strálurnar yvir danska høvuðsstaðin, áðrenn føroysku hondbóltskvinnurnar vóru á fótum.

Eftir eina flogferð á knappar tveir tímar, skuldi ferðalagið víðari til Andalo. Hetta varð gjørt við bussi, og tó at talan var um ein góðan av slagnum, so kann tað helst tykjast nakað stríggið, tá tú beint eftir tveir tímar í flogfari skalt á tríggja tíma langan busstúr. Ikki minst hjá roykjarunum mundi tað kennast heldur tungt, tí líka mikið hvar eyguni leitaðu á Malpensa-flogvøllinum, so stóð »Viedeto fumare«, ella tað, sum tey í Onglandi kalla fyri »no smoking area«.

Royking ella ikki, so koyrdi bussurin so skjótt, sum alt viðførið var fingið til høldar, og við einum einstøkum steðgi á vegnum, gekk leiðin so úr Milano, fram við vakra umhvørvinum við Garda-sjógvin og so norður móti italsku Alpunum, har steðgað varð við Mezzocorona, har sjálv kappingin fer fram.

Her stóð ferðalagið framvegis við føturnar á imponeradni fjøllunum, sum steyrrrætt stremba upp móti himni, og tað skuldi eisini vísa seg at vera ein serstakur busstúrur eftir, áðrenn skeltini hjá Regents Hotel í Andalo sóust. Tíggjutals vegbogar av tís lagnum, sum danir rópa »hårnålesving« skuldu rundast, áðrenn komið varð til býin, og tað mundi næstan vera soleiðis, at leikararnir nú vistu av, hvussu Lance Armstrong og hansara menn kenna seg, tá teir stríða seg upp eftir fjøllunum í stóru Tour de France súkklukappingini. Onkur av leikarunum fór enntá at gremja seg um sjóverk, soleiðis sum stóri bussurin vaggaði frá síðu til síðu, men tíbetur gekk tað ikki av álvara galið hjá nøkrum teirra.

### Lætt at byrja við

Soleiðis mundi klokkan vera um trý seinnapartin, tá hópurin loksins kom fram, og eftir ein stuttan steðg, har viðføri og annað kundi fáast upp á pláss, gekk leiðin aftur Mezzocorona, har liðið longu týskvøldið hevði fyrstu venjingina.

Sum so mundi talan tó ikki vera um tað heilt stóra trýstið frá venjarunum báðum til hesa venjingina. Heldur ráddi um at fáa rørt bein og armar, sum nú í mest sum heilan arbeiðsdag høvdu sitið pinnastív á bussferðini.

Mikumorgunin hevði landsliðið aftur møguleika at venja, men Flemming Raben og Rógvi Nielsen gjørdu tó av, at leikararnir skuldu hava frí hesaferð. Ikki minst tí ein sera krevjandi dystarskrá stendur fyri framman. Fimm dystir innan fimm dagar er ikki tað, sum leikararnir eru vanar við heimanífrá, og tí mundi hvíld eftir drúgvu ferðina standa minst líka ovarliga á ynskilistanum.



*Týskvøldið hevði landsliðið so fyrstu venjingina í Italia, og longu mikudagin seinnapartin var fyrsti dysturin á skránni*



# Álitið á strikuni

**Seinastu tvey árini hevur Gunnleyg Berg leikt hondbólt í Danmark, og einki er at ivast í, at hon verður roknað sum ein á grundstuðlunum á liðnum, sum hesa vikuna tekur lut í Challenge-Cup kappingini**

CHALLENGE-CUP


*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Mezzocorona, Italia: Ein av leikarunum, sum tað uttan iva verður roknað nógv av á italiuferðini, er Gunnleyg Berg.

Seinastu tvey árini hevur hon talst millum útisetarnar í føroyskum hondbólti, har hon eitt skifti royndi seg hjá samansetta Skovbakken/Brabrandt, sum tó nú er farið í tvíningar aftur, og sostatt bara eitur Brabrandt.

### Gularótin hevur manglað

Hóast hetta í sjálvum sær hevur verið ein mennandi avbjóðing hjá henni, so dylir Gunnleyg ikki fyri, at tað er ein spennandi avbjóðing, sum leikararnir hava fingið, nú landsliðshondbóltur aftur er á skránni.

- Tað er heilt víst, at tað er nakað, sum hevur manglað. Bæði tí, at tað er nakað serligt at spæla á landsliðnum, men eg rokni so sanniliga eisini við, at støðið hevði verið hægri, um talan alla tíðina hevði verið um eitt aktivt kvinnulandslið. Til dømis eru jú nógvir leikarar, sum fara uttanlands í lestrarørindum, og eg ivist ikki í, at fleiri teirra høvdu gjørt meira við hondbóltin, um tær eisini høvdu havt landsliðið sum eina gularót, sigur hon.

### Á danskari talentfabrikk

Og tá tosið fellur inn á umstøðurnar at venja og leika í Danmark, so dylir Gunnleyg ikk fyri, at hesar eru munandi betri, enn tær eru í Føroyum.

Tá hon var við í samansetta liðnum, tók felagið lut í bestu donsku deildini, men nú hon er í Brabrandt, er talan blivin um 1. deildarhondbólt. Ein støða, sum tó er broytt, tí umskipanir av donskum elituhondbólti førdu við sær, at ikki færri enn seks lið fluttu niður í triðbestu deildina, og var Brabrandt millum hesi.

- Talan er tó framvegis um rímuliga høgt støði, og málið hjá okkum er so eisini, at vit innan tvey ár skulu vera í næstbestu deildini. Og hóast talan var um at fara eitt trin niður, so ivaðist eg onga løtu, tá eg skuldi velja millum Skovbakken og Brabrandt. Brabrandt hevur altíð havt eina støðu sum felag, ið alir nógvar góðar leikarar, og venjarin, sum vit her hava, er uttan iva besti venjarin, sum eg havi havt. So sjálv haldi eg í øllum førum, at eg framvegis fái nógv burtur úr her í felagnum, sigur hon.



*Gunnleyg Berg ivast ikki í, at støðið í føroyskum kvinnuhondbólti kundi verið hægri, um landsliðsaktiviteturin hevði verið á hægri støði seinnu árini*

### Mugu halda avtalurnar

Sum nevnt aðrastaðni her á síðuni, so verður fyrsti dysturin hjá føroyska landsliðnum móti Belgia, og tað líkist í øllum førum eini stórari uppgávu.

Í seinastu Challenge Trophy kappingini gjørdist Belgia nummar tvey, so talan verður í øllum førum um eina veruliga styrkisroynd hjá okkara, nú tær fyri fyrstu ferð taka lut í hesi kapping.

Og fyri at meta um støðið í kappingini, so er helst eisini neyðugt við slíkari styrkisroynd.

Kunnleikin til mótstøðuliðini er í øllum førum minimalur, men hóast hetta, so tykist tað ikki vera nakað, sum nervar Gunnleyg tað heilt stóra.

- Vit mugu so bara fáa okkara spæl at koyra. Vit skulu fyrst og fremst hava verjuna í gongd, og í aðrar mátar mugu vit halda okkum til tær avtalur, sum vit hava gjørt. Megna vit tað, so ivist eg ikki í, at úrslitið fer at verða á eini leið, sigur altso Gunnley Berg at enda.


**Krambafólk**
**Til Havnar Timburhandil**

**Vit sóknast eftir tveimum fólkum til Byggimarknað okkara í Tórshavn.**
**Størvini verða sett skjótast gjørligt ella sambært avtalu.**

Byggimarknaðurin er býttur upp í minni deildir. Hesi bæði fólkini verða sett at røkja hvør sína deild. Umframt hetta fevna størvini um vanligt sølu- og avgreiðsluarbeiði.

**Vit vænta at tú:**
- hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði
- ert fyrikomandi og útatvend/ur
- ert nærløgd/nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarvað við onnur

Løn sambært sáttmála við S&K

**Umsóknin skal sendast til:**

Timburhandilin
Heykavegur 4, Box 3038
FO-110 Tórshavn

Att: Jógvan Jørgensen

*Hevur tú spurningar kanst tú venda tær til okkum á tlf. 31 12 50*

TIMBUR HT HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41
www.timburhandilin.fo

Timburhandilin • 3112 50





***Starvsfólk til Perluna í SMS***

**Hálva tíð**
Søkt verður fólki M/K at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber.
Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi.
Vit læra teg á staðnum...

**Fulla tíð**
Søkt verður fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

Perlan

Send umsóknina til: Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn, innan 15. mai 2004.

petur & petur • 320870